VIÐMERKINGAR

# Landsfundur Sjálvstýrisfloksins í Vágunum

**Kári P. Højgaard**
*løgtingsmaður*



Landsfundurin seinasta vikuskifti hevur fingið góða blaðrúmd ávikavist í Sosialinum og Dimmalætting. Hesir miðlar høvdu sent blaðfólk á fundin.

Nú hava seinastu landsfundirnir verið opnir fyri pressuni og er tað at fegnast um, at bløðini senda umboð, so føroya fólk fær eina hóming av, hvat hendir á slíkum fundum. Eg má tó siga, at hevði væntað eina meira objektiva frásøgn enn hana, blaðmaðurin á Sosialinum borðreiddi við týsdagin. Samanumtikið má ásannast, at blaðmaðurin ger sínar persónligu niðurstøður, ið síðan verða borðreiddar fyri lesarunum sum ein liðugtrættur. Heldur átti hann at greitt frá hvat veruliga hendi, og lata lesaran gera sínar egnu niðurstøður. Blaðmaðurin var valevni hjá politiskum flokki, ið situr í samgongu, og boðskapurin er í alt ov stóran mun er litaður av hesum.

Hvat hendi so á fundinum?

Limirnir vóru sum vanligt er kunnaðir um mál, ið Sjálvstýrisflokkurin hevur arbeitt við farna árið.

Sjálvstýrisflokkurin metir at gransking eigur at raðfestast í fremstu røð og var hetta eisini nevnt í frágreiðingini. Formaðurin fekk eitt herðaklapp frá gestarøðaranum Eyðun Andreasen formanni í Granskingarráðnum, fyri floksins støðu og útsøgn um gransking í Løgtinginum.

Niðurgerandi sigur blaðmaðurin á Sosialinum:

*"Formaðurin harmaðist um, at tað hevur verið so torført at fáa samskifti millum floksleiðsluna og baklandið. Men tað skuldi nú betrast. Og til at gera tað lættari, hevur flokkurin keypt eina farteldu til skrivstovuna.*

Eg greiddi frá, at vit høvdu keypt eina kanón og eina farteldu, sum fyrstu ferð vóru roynd nú á fundinum. Hetta fór at lætta um og betra møguleikarnar at fáa boðskapin út, tá vitja bleiv úti hjá lokalfeløgunum.

Somuleiðis varð greitt frá mikudagsfundunum á Gamla Apotekið, har tingmaðurin og baklandið tosaðu saman um aktuell mál, hetta var nýggjur táttur og var hetta ein styrki fyri tingarbeiðið.

Eitt dagsaktuelt mál vóru bygnaðarbroytingarnar hjá Toll- og Skatt, sum landsstýrismaður Sambandsfloksins í fíggjarmálum hevur ábyrgdina av. Her hevði undirritaði eina greiða støðu til niðurleggingarnar av deildunum í Vágum, Saltangará og Klaksvík. Vísti á at einar 12 mió eru brúktar til bygning í Klaksvík og áðrenn flutt er inn verður avgerð tikin um at flyta burtur. Hetta verður heldur ikki nevnt í Sosialinum.

Heldur ikki verður nakað nevnt um ivasemi Sjálvstýrisfloksins til førda fíggjarpolitikkin hjá hesari samgonguni. Samtyktin vísir floksins støðu til nøkur tídningarmikil mál, samstundis sum høvuðsdentur verður lagdur á gransking og at landstýrismaðurin í fiskivinnumálum støðgar spekulatiónini við fiskiloyvum.

At aldargamli Sjálvstýrisflokkurin nú er í ferð við at leggja árarnar inn og er komin á deyðastrá, er ynskidreymur hjá politisku mótstøðumonnum floksins. Vit eru fleiri, ið eru av tí áskoðan, at framtíðin við teimum avbjóðingunum ið liggja fyri framman hjá føroysku tjóðini, best verða loyst samsvarandi teimum ætlanum, val- og stevnuskrá Sjálvstýrisfloksins slóða fyri.

Politiska søgan her á landi hevur prógvað, at brúk er fyri Sjálvstýrisflokkinum. Vit høvdu framgongd til fólkatingsvalið og flokkurin kemur sterkt aftur til komandi løgtingsval. Svarið er ein greiður boðskapur, ídni, trúfesti, samanhald.

# Ver nú realistiskur Kári

**Edvard Joensen**
*blaðmaður*



Tað er hvørki persónliga politiskt litað ella niðurgerandi, sum blaðmaðurin á Sosialinum skrivaði frá landsfundi Sjálvstýrisfloksins í Vágum.

Hvørja politiska sannføring blaðmaðurin hevur, er slíkum uppgávum fullkomuliga óviðkomandi, og tað hevur blaðmaðurin eisini í hesum førinum hildið uttanfyri.

At blaðmaðurin gjørdi eina niðurstøðu út frá tí, sum hendi á fundinum, er sjálvsagt. Tað er tað hann fór til. Eitt fundarreferat minutt fyri minutt er óáhugaverd. Tað, sum ræður um, er at fáa tað »vesentliga«, sum hendi á fundinum, út til lesaran. T.d. hvørjar framtíðarætlanir flokkurin hevur. Hvønn politikk fer flokkurin at reka í framtíðini?

Tað, sum er farið, er søga, sum lesarin longu hevur fingið at vita, og er tí óáhugavert at hoyra umaftur í eini landsfundarfrásøgn í blaðnum.

At ein andstøðuflokkur er ósamdur við samgonguna, er eingin nýggjheit. Tað er sjálvsagt, og eftir blaðmansins meting ikki neyðugt at brúka blaðrúmd uppá.

Annars átti tað, sum onkur fyrrverandi framstandi sjálvstýrismaður hevur gjørt eftir landsfundin, at fingið formannin at hugsa um, um ikki tað, sum stóð í Sosialinum nú mundi vera á rættiliga góðari leið.

# Jú, eitt orð er eitt orð



Í bløðunum um dagarnar sigur Símun á Høvdanum, at undirritaði ikki hevur hildið orð, tá um avgreiðslugjaldið uppá 30 kr ræður, sum Toll- og Skattstovan krevur, nú fyritøkur gera arbeiðið vegna myndugleikarnar.

SáH setti spurningin til Fólkaflokkin í ÚF-kjaki undan løgtingsvalinum fyri ári síðani, har trý fólkafloksvalevni svaraðu spurningum frá lurtarum.

Undanfarni løgmaður og núverandi formaður í fíggjarnevndini, Anfinn Kallsberg, undirritaði og Fólkaflokkurin hava verið samd um, at tá tollautomatisering er framd, so skal vinnan nýta hesa tænastu kotsnaðarleyst. Fyritøkurnar gera tá vituligt arbeiðið fyri tað almenna.

Tí heldur Fólkaflokkurin fast við sjónarmiðið um, at avgreiðslugjaldið eigur at falla burtur og var hetta jú eisini støðan undan seinasta løgtingsvali.

Fólkafloksins sjónarmið eru landsstýrismanninum í fíggjarmálum kunnug. Hann hevur málsræði á økinum og ger sostatt av nær gjaldið verður strikað. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur eisini boðaða frá, at tá tollautomatiseringin er virkin um alt landið, vil hann taka avgreiðsluavgjaldið til endurmetingar við tí fyri eyga at strika tað.

So, Símun á Høvdanum, bæði undirritaði og Fólkaflokkurin halda við støðuna undan valinum í fjør um kostnaðarleysa avgreiðslutænastu.

Vit seta okkara álit á landsstýrismannin í fíggjarmálum, at hann í næstum fer at avgreiða málið samsvarandi sjálvsagda ynski okkara. Livst so spyrst.

**Vinaliga**
**Bjarni Djurholm**

# Hóttanin mót alt lív er fávitska

**Unn í Dali**

Citat frá Chief Dan George:

*Um tú tosar við dýrini,*
*tosa tey við teg.*
*Um tú ikki tosar við tey,*
*lærir tú tey ikki at kenna.*
*Og tað tú ikki kennir,*
*gevur tær ótta.*
*Tað tú óttast drepur tú.*

Vit kunnu, um vit ynskja tað, læra ómetaliga nógv av okkara sambúgvum her á jørð. Kettan lærir teg, at finna frið við tær sjálvum, at virða teg sjálvan og tað sum er. Hygg eina ferð, hvussu hon gevur sær tíð at sleikja sær, at hvíla og finnur fri.

Hundurin lærir teg trúðfesti og endaleysan kærleika. Hygg, hvussu hann fylgur øllum tú gerð og hvussu hann oysur kærleika til tín, óansæð hvussu tú handfert hann. Hann baktalar teg ikki.

Fuglurin, sjálvt um tú hevur sett hann í búður. Hann lærir teg, at syngja og lovprísa lívi. Sjálvt um øll eggini fórust, so syngur hann av hjartanum. Hann finnur gleðina aftur, beint sum sólin rísur. Ein nýggjur dagur, ein nýggjur sangur.

Eiturkoppurin vísur okkum, hvussu vit kunnu spinna okkara lívsleið við gávum. Hvussu vit lætt kunnu ganga leiðina, uttan at snáva.

À henda hátt tosa tey við okkum, hvønn dag. Uttan at ótolnast og fordøma, at vit ikki lurta og uttan mun til, hvørji vit eru, so tosa tey við okkum. Kongar og biddarar eru líka, í eygunum á okkara sambúgvum og Gudi.

Illviljin móti okkara sambúgvum, er grundaður á fávitsku. Hygg at teimum og Guds orði: Kettan = elska teg sjálvan, so tú eisini kan elska onnur.

Hundurin = Tann endaleysi kærleikin og trúfesti.

Fuglurin = lovprís lívi í takksemi, syng eisini fyri teimun, sum einki eiga, so tey kunnu eiga sang.

Eiturkoppurin = halt leið tína reina og óttast ei morgindegnum.

Eitt serliga kent dømi, nú várið er í nánd. Eg hugsi her um allar hvølparnar og kettlingarnar, sum verða dripnir á bæði líkinda og ólíkinda hátt. Uttan viring fyri tí einstakað og rættindi til lív, verður høvdið slitið av hesum forsvarsleysu kroppum. Og hugsa tær til, at mamman ber ikki illan huga til tín. Um tú steinar, druknar, blakar ella kroystur, hesi smáu hjørtu. Kettan ikki eingang rýmir og hundurin elskar teg, eins og Gud ger, óðansæð hvat tú gert. Fávitska og manglandi kærleiki, er orsøkin, til henda sorgarleik.

Ego-kærleikin blendar okkum menniskju. Vit halda okkum elska, bert við at hugsa, at vit elska.

Tað ber til, at taka ábyrgd, at handla! Fyribyrging av føðing av kettlingum og hvølpum, er ein veruligur møguleiki. Men bert, tá kærleikstankin er blivin ein útliva kærleikskensla.

Vit menniskju hava flutt okkum frá tí upprunaliga, sum er, at liva við náttúruni og kærleikskensluni, til at liva av náttúruni og kærleikstankanum.

Eitt dømi um tað, er maturin vit eta. Men bert tí vit hava valt at eta kjøt, er tað ikki neyðugt at slakta meir enn etið verður. Her er tað, at vit liva av náttúruni. Høvdu vit bert tikið tað, sum var neyðugt, og harvið víst virðing, livdu vit við náttúruni. Og tað hevði verið nokk av mati til øll. Tað fara fleiri tons av matvørum um árið, enda sum rusk her heima í Føroyum, grundað á vanvirðing/fávitsku og tørvandi kærleika. Menniskjur doyggja av svongd, kring allan heim, av somu orsøk. Jesus heitti á, at samla allar molarnar saman so onki fór til spillis.

Vit eiga ábyrgdina. So einkult er tað. Men eiga vit kærleikan?

Millum nærum øll dýr í Føroyum er kettan ikki eitt upprunadýr, ei heldur hundurin. Tað eru vit menniskju, sum hava valt, at hesi dýr skulu vera her. Sum tænarar skulu tey hjálpa okkum. Hundarnir nýtast sum seyðahundar, vagthundar, førarahundar og til pynt. Kettan sum rottu- og músafangarar og eisini til pynt. Vit hava ábyrgdina av, at hesir arbeiðsomu og trúfastu sambúgvar, sum vit hava valt at takað ræði á, verða handfarnir við virðing og kærleika.

Óvitanin hevur sníkt seg sum tjóvur á nátt, innyvir hjørtu okkara og kølt tey niður. Vit hava nýtt heilan so leingi, at vit hava gloymt at liva hjarta. Tíðin er nú komin, at vit velja at liva við náttúruni, og liva kærleikskensluna.

Áhugavert er tað, at tað einasta organið, sum ikki er virt í mumiunum, funnar í Egyptalandi, er heilin. Hann er sogin úr høvdunum og koyrdur burtur sum óbrúkilit rusk!